

# Starvsfólk til Roknskapardeildina

Søkt verður eftir starvsfólki til Roknskapardeildina hjá Atlantic Airways. Starvið er eitt avloysarastarv, og er tíðaravmarkað til eitt ár.

**Arbeiðið fevnir um:**
Alt vanligt bókhaldsarbeiði.

**Krøv**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin:
- hevur kunnleika til bókhald
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góðan røkjuskap
- hevur kunnleika til at arbeiða við teldu

Vit bjóða eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum, og møguleika fyri fakligari og persónligari menning í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Avloysarin skal setast skjótast gjørligt, og setanartreytir verða avtalaðar nærri við setan.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 19. oktober 2006. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Tórhalli Halgaklett, roknskaparleiðara á tlf. 34 10 35 ella e-mail: torhallur@atlantic.fo.

**Umsóknin skal sendast til:**
Atlantic Airways, Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðari, Vága floghavn, 380 Sørvágur, ella til steinbjorn@atlantic.fo.

www.sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 180 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 378 milliónir krónur í 2005. Atlantic Airways hevur seks flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum — www.flyfaroes.com

**www.bkv.fo**



## Sethús til sølu

Sethús á matr. 49a á Sandi. Húsini eru í tveimum hæddum, hvør hæddin 50 kvm. gjørd av betong og klædd við plasttilfari. Giðring er um húsini við træverki. Húsini eru frá miðs. í 30-árunum og grundøki er uml. 580 kvm. Sunnanfyri vegin er eisini eitt stykki sum er 406 kvm. stórt og sum ein kann byggja á.

Meiri á heimasíðu okkara, www.bkv.fo

**BKV Terji Dalsgaard**
**Tlf. 361 376**
*Kring Føroyar...*




VINN EINA SKÍÐFERÐ FYRI 2 VAKSIN OG 2 BØRN FRÁ SMYRIL LINE



## Á akfjøl í Voss og Hemsedal

Møguleiki er eisini fyri at gera annað enn at standa á skíð, bæði í Voss og í Hemsedal. Í báðum støðum er møguleiki fyri at standa á »snowboard« – ella akfjøl sum tað eitur á føroyskum. Ein kavaskutara kann ein eisini leiga, um áhugi er fyri hesum.

## Dagsins spurningur

Hvussu verður akfjølin eisini ofta rópt?

- ☐ Surfboard
- ☐ Blackboard
- ☐ Snowboard

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Tlf. nr: ____________________

Sendi okkum loysnina til:
Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Merk brævbjálvan »Skíðkapping«

Í samstarvi við Smyril Line fara vit hvønn dag í 14 dagar at skipa fyri eini spurnarkapping. Nýggjur spurningur verður hvønn dag í Sosialinum. Jú fleiri svar tú sendur inn, jú fleiri møguleikar hevur tú at vinna. Svarlepin skal tó vera kliptur úr blaðnum – avrit verður ikki góðtikið. Seinasta freist at senda inn er mikudagin 18. oktober. 2006.

**Vinningur:** Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili á leiðini Tórshavn-Bergen og aftur í 4 koyggjukamari við vindeyga og wc/bað. Allar máltíðir umborð eru íroknaðar. Hartil 9 nætur í íbúð fyri 4 persónar á Fleischers Apartment í Voss í Noregi. (máltíðir ikki íroknaðar). Virðið á ferðini er uml. kr. 11.995,-.







VIRÐI: 11.995,-

Sosialurin